miðvikan
Nr. 168 • 03. sept. 2008
**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar



**Elsa Jacobsen:**

# Foreldrini funnu konuna og væl riggaði

**Hjá Elsu er virksemið kristniboðan og sjúkrarøkt. Her er nógv øðrvísi enn hjá okkum. Eisini er frásøgn um, tá ið ein ungur maður varð forlovaður. Hetta hevði hann onga ávirkan á, men væl riggaði kortini**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**4. partur**

Í seinasta parti greiddi Elsa frá sínum virksemi sum jarðarmóður í Etiopia. Veruliga havi eg sjálvur, sum skrivi hetta, hitt eitt av børnunum, sum Elsa hevur tikið ímóti.

Hetta var í Íslandi í 2006, har eg royndi at finna fram til upprunan hjá føroysku sjómansmissióni í Reykjavík. Tann, sum stóð fyri henni, var Alfred Petersen, sum seinni gjørdist formaður fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið, sum sendi Elsu til Etiopia. Vitjað var eisini á KFUM, har Elsa kom á møti, tá ið hon var í Íslandi.

Har hitti eg fyrst Ragnar Gunnarsson, sum er abbasonur tann kenda íslendska føroyavinin Jóhannes Sigurdsson. Spurdi, um hann kendi Elsu. Jú, tað gjørdi hann, men kanska Bjarni Gislason, sum sat við síðuna av, visti meira. Jú, tað kundi sigast, tí Elsa hevði tikið ímóti honum, tá ið hann var føddur! Foreldrini hjá honum, Gisli Arnkelson og Katrin Guðlaugsdóttir, høvdu arbeitt saman við Elsu í Konso. So tá ið mamman skuldi eiga, var tað so heppið, at jarðarmóðir var á staðnum. Bjarni var fyrsti og einasti europeari, sum er føddur í Konso. Aftaná var fyriskipað at konur skuldi bert eiga, har læknar vóru til staðar.



*Bjarni Gislason er einasti europeari, sum er føddur í Konso. Jarðarmóður var Elsa úr Gøtu*

Bjarni varð eisini doyptur samstundis sum tvíburarnir hjá Elsu, sum heldur áfram við síni frásøgn:

## Noktaði at ansa eftir trøllmannatrummum

Kaute, vaktmaðurin hjá okkum, var trúgvandi. Ein beiggi hansara doyði av eini leyvu, sum órógvaði bygdina. Tað eydnaðist at fáa lívið av henni, men tá ið avtornaði, lá hesin maðurin deyður undir leyvuni. Hann var okkara postmaður. Hann plagdi at fara til gongu til Gidole við og eftir posti. Hetta var ein rættuligur gongutúrur, átta tímar hvønn vegin.

Kaute greiddi mær frá, at fyrr tilbað hann trø og steinar eins og mong onnur. Trummurnar, sum verða nýttar til djevlatænastur, skuldi ein maður hava ábyrgdina av eitt ár í senn.

Eina ferð komu teir til hansara og søgdu, at nú var tað hansara tørn at ansa eftir trummunum. Men hann sýtti. Teir blivu rúkandi illir og drógu hann fyri rættin. Men hann varð fríkendur.

Beiggi hansara hótti hann við, at hann fór at doyggja, tí hann hevði brotið fedranna siðir, men tað tóktist ikki at bila. Hann livdi sítt fulla lív.

Hann var annars doyptur samstundis sum Bjarni, Jákup og Jóhannes.



*Her bíða Bjarni, Jóhannes og Jákup eftir at verða doyptir. Elsa sitir undir Jákupi, íslendska Margret situr undir Jóhannesi. Mammman Katrin situr undir Bjarna. Undir liðini á teimum eru systkini Valgerður og Guðlaugur, sum bæði seinni gjørdust trúboðarar. Valgerður dugdi ikki at skilja, at mamman skuldi liggja í songini fyri tað, um hon hevði fingið eitt barn. Elsa hevði fingið tvey, og hon gekk uppi*

## Føðingardagur keisarans

Sum tað skilst varð nógv gjørt burtur úr keisaranum. Fleiri ferðir árliga var okkurt at hátíðarhalda í samband við hann og hansara lív. 23. juli 1967 var sunnudagur og 75 ára føðingardagur hjá Haile Selassie. Tað vóru røður hildnar um keisaran, og skúlabørnini sungu. Síðan vóru koptiskir prestar, sum messaðu og sungu. Í Konso var koptisk kirkja á amahariska økinum.

## Detta í eldin

Tað koma 100-150 sjúklingar um dagin til klinikkina. Tað hava verið upp til 250 ella fleiri sjúklingar ein dag í Konso, og tá hevur verið nógv at gera. Tað var tó ikki alt, sum tók sum so langa tíð. Ofta var tað malaria, sum kann avgreiðast skjótt.

Tað var mest malaria, sum herjaði hesa tíðina. Mong vóru so sjúk, tá ið tey komu til klinikkina, at tey vóru meira deyð enn livandi.

Tað hava eisini verið nógv brunasár. Tey hava eldin á gólvinum í smáttunum, og tað var ikki sjáldan, at smábørn sum spældu inni, duttu í eldin og brendu seg.

Ein ung kvinna, sum lá her, var dottin við andlitinum niðureftir í eldin. Hon kom ikki á klinikkina beinanvegin. Mangt hevur ein sæð gjøgnum tíðina, men hetta var tað ringasta, eg havi sæð, tá ið tey loksins komu við henni. Væntaði ikki, at hon bleiv til fólk aftur. Men tað er ótrúligt, sum brunasár kunnu lekjast aftur.

Ein dagin komu tey við einum seks ára gomlum drongi, sum var bitin av eini slangu eina viku frammanundan. Hevði hann komið beinanvegin, hevði ikki verið